sev

# Notat.

## Ítøkiligar viðmerkingar frá Sev til Løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um framleiðslu, flutning og veiting av ravmagni (elveitingarlógin) – LM-090/2023.

Sev gjørdi í telduposti frá 19. februar 2024 sínar yvirskipaðu viðmerkingar til lógaruppskotið, sum tá fyrilá (fylgiskjal 3).

Eftirfylgjandi er eitt broytt uppskot lagt fyri tingið og loyvir Sev sær at gera niðanfyri nevndu viðmerkingar; hetta deils fyri at rætta ávís mistøk og deils fyri at gera tekstirnar meira neyvar og eintýddar.

Sev hevur ikki nakað at viðmerkja til sjálvan lógartekstin.

1) Undir ***Kapittul 1. Almennar viðmerkingar*** skal gerast vart við, at semjan frá 22. mars 2022 er gjørd millum landsstýrið, Kommunufelagið og Sev. Í punkt 1.1 undir ***Orsakir til uppskotið*** er hetta soleiðis skeivt endurgivið í trimum støðum, tvey støð í 2. broti og eitt stað í 5. broti.

2) Undir ***1.2 Galdandi lóggáva*** 3. brot eigur setningurin «*Kortini hava kommunur, havnir, tjaldingarpláss o.o. selt el víðari í smásølu til bátar, húsvognar o.tíl.*» at víðkast soleiðis «*Kortini hava kommunur, havnir,tjaldingarpláss o.o. selt el víðari í smásølu til bátar, skip, húsvognar o.tíl*».

3) Undir **1.*4 Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum*** 1. brot eigur at verða broytt soleiðis «Skipanarberandi eindir eru Sundsverkið, ...» til «*Skipanarberandi eindir eru termisku verkini, ...*».

4) Í 3. broti stendur hendan ásetingin «*Interkommunala elfelagið, sum rekur royndar-, framleiðslu- og søluvirksemi er samstundis tann parturin, sum er ella kann verða útsett fyri kapping*». Neyðugt er fáa staðfest, at tað ikki eru avmarkingar hjá Sev sum kerviseigara og kervisábyrgdara at fremja royndarvirksemi.

5) Í 8. broti stendur «*Upplýsingar skulu skilmarkast á rokningini til kundan.*» Her eigur «*skal*» at verða broytt til «*kann*». $CO_2$ útlátið skal upplýsast á annan hátt, men tað má ikki blíva eitt krav, at hetta skal gerast á rokningini.

6) Undir ***Kapittul 3. Serligar viðmerkingar*** undir ***3.1. Viðmerkingar til tað einstøku greinina*** skal gerast vart við:

   Til *§ 1, nr. 3* í 1. broti eigur setningurin «*Kervisábyrgdin fevnir m.a. um at tryggja javnvág í elveitingini*» at verða longdur, so hann ljóðar soleiðis

*«Kervisábyrgdin fevnir m.a. um at tryggja 1) javnvág í elveitingini, 2) systemoperatørleiklutin og 3) veitan av skipanarberandi tænastum».*

7) Til *§ 1, nr. 3* í 2. broti eigur setningurin *«Harumframt eru allar skipanarberandi eindir við tilhoyrandi framleiðslu, sum til dømis størri termisk verk, størri vatnverk og møgulig pumpuverk, partur av elnetinum»* at broytast til at verða soljóðandi *«Harumframt eru allar skipanarberandi eindir við tilhoyrandi framleiðslu, sum til dømis størri termisk verk, størri vatnorkuverk og møgulig pumpuverk, eins og royndar-, granskingar- og menningarverkætlanir við tilhoyrandi framleiðslu, partur av elnetinum».*

8) Til *§ 1, nr. 3* í 3. broti eigur setningurin «*Sostatt er tað ikki longur SEV sum elframleiðari, ið sipað verður til í lógini, har SEV er nevnt*» at broytast til at verða soljóðandi *«Sostatt er tað ikki longur SEV sum elframleiðari innan vind-, sól-, aldu- og sjóvarfallsorku, ið sipað verður til í lógini, har SEV er nevnt».*

9) Til *§ 1, nr. 3* er í 4. broti skeivt endurgivið hvat semjupørtunum viðvíkir, sí eisini viðmerking 1 omanfyri.

10) Til *§ 1, nr. 11* er í 1. broti skeivt endurgivið hvat semjupørtunum viðvíkur, sí eisini viðmerking 1 omanfyri.

11) Til *§ 1, nr. 15* er í 1. broti skeivt endurgivið hvat semjupørtunum viðvíkur, sí eisini viðmerking 1 omanfyri.

12) Til *§ 1, nr. 15* í 12. broti eigur setningurin «*Her verður serliga hugsað um víðarisølu til bátar, húsvognar o.tíl.*» at verða víðkaður soleiðis *«Her verður serliga hugsað um víðarisølu til bátar, skip, húsvognar o.tíl».*

13) Til *§ 1, nr. 15* í 14. broti eigur setningurin «*Ætlanin er, at elprísirnir verða ásettir tíma fyri tíma yvir næstkomandi døgn, grundað á veðurforsagnir*» at verða víðkaður soleiðis «*Ætlanin er, at elprísirnir verða ásettir tíma fyri tíma yvir næstkomandi døgn, grundað á veðurforsagnir, tøk framleiðsluverk, netviðurskiftir o.a.».*

14) Til *§ 1, nr. 15* í 16. broti eigur setningurin «*Hetta er eisini liður í at benda elnýtsluna og elprísirnar til tíðarskeið, har nógv varandi elorka er tøk*» at verða víðkaður soleiðis «*Hetta er eisini liður í at benda elnýtsluna og elprísirnar til tíðarskeið, har nógv varandi elorka er tøk og tá ið ledigur kapacitetur er á netinum».*

15) Til *§ 1, nr. 15* í 18. broti eigur hesin setningurin at verða lagdur afturat «*Serligar avtalur kunnu gerast fyri einstakar størri kundar av ávísum slag í eitt avmarkað tíðarskeið um serligan prís fyri el, ið annars ikki ber til at gagnnýta*». Sí eisini viðheft serskilt notat frá Sev dagest 19. apríl 2024

hesum viðvíkjandi.

16) Til *§ 1, nr. 15* í 19. broti eigur setningurin «*Í viðskiftatreytunum við stórkundarnar kann eitt nú verða ásett, at elveitingini kann brótast av, um SEV brádliga fær tørv á tí, at íbindingartreytirnar verða nakað lagaligari enn tær annars vildi verið og at kundarnir skulu verða íbundnir netið á 10/20 kilovolt spenningi*» at verða broyttur soleiðis «*Í serligum avtalum við einstakar stórkundar kann eitt nú verða ásett í eitt avmarkað tíðarskeið, at elveitingini kann brótast av, um SEV brádliga fær tørv á tí, at íbindingartreytirnar verða nakað lagaligari enn tær annars vildi verið og at kundarnir skulu verða íbundnir netið á háspenningssíðuni*». Sí eisini viðheft serskilt notat frá Sev dagfest 19. apríl 2024 hesum viðvíkjandi.

17) Til *§ 1, nr. 15* í 20. broti eigur setningurin «*Á rokningini til kundan skal upplýsast, úr hvørjari orkukeldu elveitingin er fingin, og harundir hvussu stórt útlátið av vakstrarhúsgassi hevur verið*» at verða broyttur til «*Á rokningini til kundan kann upplýsast, úr hvørjari orkukeldu elveitingin er fingin*». Sí eisini viðmerking 5 omanfyri.

18) Til *§ 1, nr. 15* í 21. broti eigur setningurin «*Krøv verða eisini sett til útgreining av elrokningini til kundaskaran, heruppií hvussu stórt útlátið av CO2 er knýtt at elveitingini*» at verða broyttur til «*Krøv verða eisini sett til útgreining av elrokningini til kundaskaran*». Sí eisini viðmerking 5 omanfyri.

19) Til *§ 1, nr. 15* í 22. broti eigur setningurin «*Tiltøkugjaldið (á donskum rådighedstarif) umboðar heilt ella partvíst kostnaðin fyri skipanarberandi tænastur hjá SEV,*» at verða broyttur til «*Tiltøkugjaldið umboðar heilt ella partvíst kostnaðin fyri net og skipanarberandi tænastur hjá SEV,*».

20) Til *§ 1, nr. 17* í 3. broti eigur setningurin «*Allir kundar skulu á rokningini fáa upplýsing um,*» at verða broyttur til «*Allir kundar kunnu á rokningini ella á annan hátt fáa upplýsing um,*».Sí eisini viðmerking 5 omanfyri.

Tórshavn hin 30. apríl 2024
Elfelagið Sev

Hákun Djurhuus, stjóri

Viðfest notat *Grundgeving fyri áseting í lógini um einstakar serligar avtalur 19. apríl 2024.*